# Virðisløn fyri banka-greinar




*Tríggir journalistar, ið hava arbeitt á Jyllands-Postinum hava fingið donsku Cavling-virðislønina fyri avdúkandi greinar um leiklutin hjá den Danske Bank í Hafnia-málinum*

Dánjal Højgaard

Cavling-virðislønin er størsta viðurkenning, latin verður í Danmark fyri journalistisk avrik.

Erik Eisenberg, Søren Funch og Jens Christian Hansen hava fingið virðislønina fyri avdúkandi og kritiskar greinar um Den Danske Bank.

*Tað er serliga málið um Hafnia, sum er orsøkin til at teir tríggir journalistarnir hjá Jyllandspostinum fáa Cavling-virðislønina. Ein av teimum, Erik Eisenberg, er eisini kendur frá føroyska bankamálinum*

**savnsmynd**

### Serliga Hafnia-málið

Dómsnevndin sigur í grundgeving sínari, at teir tríggir hava fyrst og fremst fingið virðislønina fyri sínar avdúkingar í Hafnia-málinum. Eitt mál, har teir við innanhýsis skjølum kundu prógva, at Den Danske Bank lumpaði fólk, tá hann bjóðaði út partabrøv í Hafnia - beint áðrenn konsernin fór á húsagang.

Journalistarnir hava arbeitt við Hafnia-málinum líka síðani februar 1996. Tað eru reist endurgjaldskrøv móti Den Danske Bank fyri meiri enn eina milliard krónur í málinum.

### Kendur í Føroyum

Teir tríggir journalistarnir hava í fleiri ár verið kendir fyri sín kritiska journalistikk, har teir hava broytt vanligu fatanina av mongum av risunum í donskum vinnulívi.

Ein teirra, Erik Eisenberg, man eisini vera væl kendur í Føroyum. Líka síðani miðskeiðis í 90-unum fylgdi hann sum journalistur á Jyllands-Postinum trúliga føroyska bankamálinum, og hann er pápi at mongum av teimum størstu avdúkingunum í hesum máli.




## Vandi fyri móðurmálsundirvísing

*Fleiri borgarligir flokkar í Danmark vilja taka av móðurmálsundirvísingina í kommununum*

Dánjal Højgaard

Føroysk móðurmálsundirvísingin í Danmark verður kanska tikin av.

Hettakann í hvussu so er gerast úrtslitið, eftir at málið um móðurmálsundirvísingina í Danmark aftur er reist í Fólkatinginum.

Konservativi fólkaflokkurin legði í gjár uppskot fyri Fólkatingið um at taka av móðurmálsundirvísingina. Fleiri borgarligir flokkar halda, at donsku kommunurnar ikki longur eiga at hava skyldu, at bjóða tvímálsligum skúlanæmingum undirvísing í teirra móðurmáli.

Fólkaskúlalógin staðfestir, at allir tvímálsligir skúlanæmingar hava krav um móðurmálsundirvísing. Eru 12 børn, sum hava sama mál í eini kommunu, hava tey rætt til at fáa undirvísing í teirra máli í heima kommununi

Kritikararnir halda kortini, at skipanin við móðurmálsundirvísing forðar fyri, at tilflytararnir gerast partur av danska samfelagnum. Og tí vilja teir hava skipanina.

Vilja foreldrini læra børn teirra annað mál enn danskt, so mugu tey sjálv taka sær av hesi undirvís-ing, verður sagt.

Margrethe Vestager, ráðharri í undirvísingarmálum, sigur, at tað verður ein trupulleiki fyri børnini verður móðurmálsundirvísingin tikin av. Tí ætlar hon ikki, at taka skipanina av. Tvørturímóti. Hon ætlar at menna hana.

Føroysk børn fáa móðurmálsundirvísing í fleiri donskum kommunum.






*Heðin Mortensen heldur, at byrjast skal ovast í leiðsluni, um nakar skal sigast upp á landssjúkrahúsinum*

**Myndviðgerð: Álvur Haraldsen**

# Leiðslan má setast upp á pláss

*Heðin Mortensen sigur tað ikki bera til hjá politikarum at játta røttu upphæddirnar til Landssjúkrahúsið, tá leiðslan ikki leggur fram nakra fíggjarætlan*

John Johannessen

– Landssjúkrahúsið fær alt ov lítið av peningi. Men tað ber ikki til hjá politikarum at finna røttu játtanina til sjúkrahúsið, tá leiðslan aldri kemur við nakrari ítøkiligari fíggjarætlan.

Heðin Mortensen er argur inn á áhaldandi óskilið á Landssjúkrahúsinum, sum hann heldur botnar í líkasælu frá leiðsluni.

### Skeiv raðfesting

– Landssjúrkahúsið fekk játtanina, sum tað bað um, men kortini kemur leiðslan nú við ræðumyndum um uppsagnir vegna sparingar. Hetta hongur ikki rættuliga saman.

Heðin Mortensen metir, at leiðslan á Landssjúkrahúsinum ikki hevur megnað at raðfest játtanina innanhýsis. Hann vísir á, at talan er um ein spurning um at raðfesta rætt innanhýsis. Leiðslan á Landssjúkrahúsinum skal nevniliga raðfesta, hvussu nógvur peningur skal nýtast til íløgur, hvussu nógv skal nýtast til lønir og hvussu nógvur peningur skal nýtast til røkt av sjúkingum.

– Hesa uppgávuna hevur leiðslan á Landssjúkrahúsinum ikki megnað, og tí má hon setast upp á pláss.

Sambandstingmaðurin leggur afturat, at eftir hansara tykki, skuldi tað bert verið leiðslan á Landssjúkrahúsinum, ið varð uppsøgd.

### Eingin langtíðarfíggjarætlan

– Tað er púra vanligt fyri øll virki at leggja sær eina langtíðarfíggjarætlan. Sama er galdandi hjá Tórshavnar Býráð, har vit hava eina fíggjarætlan, ið røkkur seks ár framm í tíðina. Men Landssjúkrahúsið hevur onga langtíðarfíggjarætlan.

Hetta heldur Heðin Mortensen ikki ber til. Hann er sannførdur um, at legði leiðslan á Landssjúkrahúsinum eina langtíðarfíggjarætlan, har greitt varð frá íløgutørvi og so fram vegis fleri ár fram, so hevði eydnast at fingið Landssjúkrahúsið at virka betur.

Men Heðin Mortensen heldur, at nakað má gerast við málið nú. Tí vísir hann á, at tað er uppgávan hjá landsstýrinum at fáa viðurskiftini í rættlag.

– Ger landsstýrið einki við málið, má løgtingið koma upp í leikin, sigur Heðin Mortensen.

### Pengar ikki alt

Heðin Mortensen sigur seg meta hini bæði sjúkrahúsini vera neyðug fyri trygdina í útjaðaranum. Serliga neyðugt heldur hann tað vera, at Suðuroyar Sjúkrahús virkar væl, tí oyggin liggur so langt burturi frá meginøkinum og Landssjúkrahúsinum.

Smáu sjúkrahúsini hava eisini tørv á peningi, og tað heldur Heðin Mortensen vera í lagi. Men hann sigur seg ikki, sum tingmann í miðstaðarøkinum, kunna góðtaka, at landssjúkrahúsið ikki virkar.

– Heilsuverkið má virka. Tí skulu vit eisini játta heilsuverkinum tann pening, tørvur er á, sigur Heðin Mortensen og vísir á, tá tað ræður um heilsuna á fólki, eru pengar ikki alt. Tá skulu neyðugu upphæddirnar játtast.

– Landssjúkrahúsið kann skjótt ikki kallast Landssjúkrahús longur, men kann heldur sammetast við eina niðurslitna barakk. Tí má okkurt gerast nú, og byrjast má við, at leiðslan á sjúkrahúsinum ger eina fíggjarætlan, har víst verður á tørvin.

Heðin Mortensen vísir á, at vandi er fyri, at skilið gerst verri, tá blokkurin verður tikin av. Blokkurin var nevniliga upprunaliga ætlaður til millum annað heilsumál, og tá hesin peningur verður burtur, er sambært Heðini Mortensen, vandi fyri, at sjúkrahúsverkið fer heilt í hundarnar.

